# Jógvan í Løðuni 70 ár



Í dag 15. oktober verður ein kendur eiðismaður, Jógvan Kalsoy Mørkøre, 70 ár.

Jógvan í Løðuni, sum hann verður nevndur, er sonur Óluvu og Jóannes Mørkøre.

Jógvan í Løðuni er útbúgvin radiomekanikari. Hann lærdi í Klaksvík og var fyrsti lærlingur hjá Marstein.

Undantikið nakrar túrar við Karin K. hevur Jógvan arbeitt á Loranstøðini á Eiði. Hann byrjaði í starvi hjá Farvandsvæsenet tann 17. desember 1962, og hevur hann sostatt verið í sama starvi í stórt sæð øllum sínum arbeiðslívi.

Í dag er lítið lív í á støðini í mun til hvat tað var, tá tað var upp á tað besta. Seinastu tíðina gjørdist Jógvan sjálvur annar, meðan tað onkuntíð í sekstiárunum vóru eini 32-34 fólk, sum starvaðust á støðini. Í dag er alt so sjálvvirkandi, at tað krevst einki fólk at ansa tí.

Tað, sum almenningurin í Føroyum mest kennir Jógvan fyri, er hansara luttøka í kommunupolitikki.

Hann varð fyrstu ferð valdur í bygdarráðið á Eiði í 1966 og hevur sitið har síðan við undantaki av onkrum valskeiðum.

Men hann hevur so sanniliga eisini áhuga fyri landspolitikki, og er er tað uttan himpr Fólkaflokkurin. Nú tað í hesum døgum er ein uppgerð millum teir "liberalu" og "konservativu" í fólkaflokinum, so er neyvan ivi um, hvønn vong, Jógvan hellir til, nevniliga tann konservativa. Jógvan er konservativur, eisini í kommunupolitikki. Tað hevur hann fingið mangt høggið fyri.

Men tað er ikki so sjáldan, at vit fáa dømi um, at tað hevði kanska verið eitt sindur frægari statt, um tað ikki varð lopið á leistum fyri øllum, sum stingur seg upp. Tá kann tað eisini vera gott, um onkur heldur aftur. Tað er hetta Jógvan ger!

Jógvan hevur eisini verið stýrislimur og formaður í Føroya Kommunufelag.

Jógvan er giftur við Katrini, dóttir Pavlu og Jens Guttesen úr Havn. Tey eiga tríggjar synir, Jóannes, Janus og Ólavur.

Tað ber illa til at umrøða Jógvan uttan at nevna Katrina. Tað kann sigast um tey bæði, at tey eru eini framúr hjún. Tey eru sera trúføst, kann siga tað av royndum. Tey eru eisini so sera gestablíð. Hetta er ikki minst komið væl við hjá ætt og vinum hjá Katrin í Havn, sum hava havt teirra heim at fara til, tá farast skuldi á bygd.

Føðingardagurin verður hildin í høllini á Eiði, og hetta er einki ov stórt, tá ið føðingardagurin nú skuldi haldast. So nógv fólk kenna tey.

Tey bæði hava eisini eina sjáldsama umsorgan fyri onnur. Tað skal ikki komast nærri inn á tað, men her hava tey eisini víst sínar menniskjansligu dygdir.

Sama dag verður yngsti sonurin, Ólavur, 25 ár. Hann hevur gjørt sítt fyri at berjast móti órættvísi í heiminum við at hava verið hermaður í Afganistan! Hetta krevur eisini sannføring og dirvi.

Ynskt verður teimum báðum tillukku.

**ó.**

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæra systir okkara

**Maria Ester Kjeld (Malla)**
**ættað úr Funningsfirði,**
**búsitandi í Íslandi**

andaðist 8. oktober, 78 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni
í Reykjavík týsdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Systkini**


Leys størv í
Tórshavnar kommunu

PEDAGOGAR

Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagstovnin í Øksnagerði eftir einum pedagogi til serstovuna at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2010 ella eftir nærri avtalu.

Eisini verður søkt eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 29. november 2010. Starvið er eitt farloyvisstarv frá 29. november 2010 til 15. august 2011.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
Saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerði 1, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 1. november 2010.

**Meiri fæst at vita**
Við at venda sær til Gunrid á Plógv, leiðara, á telefon 302260 ella 219959.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Handilslærlingur

Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda umsókn við prógvum er 31. oktober 2010.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00 – Símun Askham.

pf Maria Poulsen
Box 182 · FO-110 Tórshavn